## DAGSINS MEINING

# Útjaðarin gísli

Uttan at taka dagar í millum partarnar í tí lønarósemju, sum nú hevur elvt til arbeiðssteðg á stórum parti av almenna arbeiðsmarknaðinum, so kunnu vit uttan víðari staðfesta, at útjaðarin enn einferð er vorðin gísli. Hetta er ein afturvendandi trupulleiki, ið sum kunnugt stendst av, at ein stórur partur av manningunum á strandfaraskipunum eru limir í Starvsmannafelagnum.

Fylgjurnar av einum arbeiðssteðgi á hesum sáttmálaøki eru sera ymiskar. Tað kann soleiðis uttan víðari staðfestast, at negativu avleiðingarnar í meginøkinum í fyrstu atløgu eru avmarkaðar. Lívið gongur víðari næstan, sum um einki var hent. Almennu skrivstovurnar eru framvegis opnar. Hóast vekslarar kanska eru stongdir, so sleppur ein framat at kalla øllum teimum embætisfólkum, sum ikki eru í verkfalli, tí beinleiðis telefonnummar standa á flestøllum heimsíðum. Tað ber til at senda teldubrøv til allar almennar teldupostadressur. Løgting og landsstýri, landsstovnar, býráðs- og bygdaráðsstovur, kommunalir stovnar, tunnlar og Bygdaleiðir alt virkar at kalla ónervað av arbeiðssteðginum. Fólk sleppa aftur og fram til arbeiðis, børnini sleppa í skúla og á dagstovn sum um eingin arbeiðssteðgur var.

Verður sæð burtur frá, at vit einki SvF hava og bert eitt skert ÚF, so eru avleiðingarnar fyri meginøkið sostatt sera avmarkaðar. Vit vita væl, at sum frálíður, tá lønir, pensiónir og aðrar almennar veitingar eiga at verða avgreiddar, fara avleiðingarnar eisini at merkjast í meginøkinum á sama hátt sum tær frá fyrsta degi merkjast í útjaðaraøkjunum. Men sum sagt í fyrstu atløgu er tað útjaðarin, sum verður revsaður fyri eina ósemju, sum í roynd og veru er millum eitt fakfelag, sum hevur flestallar sínar limir í meginøkinum og so ein myndugleika í sama meginøki.

Heildarmyndin av einum verkfalli ella einum arbeiðssteðgi á starvsmannaøkinum verður ósvitaliga, at útjaðarin, ið er púra ósekur og mestsum ikki partur í konfliktini, verður revsaður og gerst gísli hvørja einastu ferð. Hetta er ikki fyri mark. Uttan mun til, hvør ið hevur ábyrgdina av ósemjuni, so styrkir hetta ikki starvsmannafelagspartin. Uttan mun til, hvør ið má sigast at verða atvoldin til ein arbeiðssteðg, so kostar arbeiðssteðgurin altíð Starvsmannafelagnum goodwill ella góðvild. Sum gongdin er innan almennu fyrisitingina, tørvar Starvsmannafelagnum góðvild. Tað kann ikki góðtakast, at útjaðarin gerst gísli hvørja ferð. Uttan mun til, hvør av pørtunum nú einaferð er atvoldin til eina ómsemju, ið leiðir til verkfall, verkbann ella arbeiðssteðg, áttu partarnir eina aðru ferð at funnið eina loysn, har útjaðarin ikki verður revsaður fyri eina ósemju, sum í høvuðsheitunum er staðsett í meginøkinum. Tað ber uttan iva til og kunnu ivaleyst finnast útvegir, ið eru eins effektivir og nú, har útjaðarin at kalla einsamallur í hvussu so er í fyrstu atløgu má bøta við at gerast gísli.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fullveldisríki, tjóðríki og hjálandaveldi

**Kaj Leo Johannesen, sambandsfloksins formaður, royndi í grein herfyri at greiða frá ráki í altjóðasamfelagnum. Tíverri var einki skil á tí, sum hann skrivaði. Her royni eg at rætta har, sum Kaj Leo fór skeivur**



**Jógvan Jacobsen,**
*formaður Unga Tjóðveldisins*

Fyrst nakrar skilmarkingar (*da: definitioner*). Eitt fullveldisríki (*da: suvuræn stat*) er ein politisk og landafrøðilig eind, sum er viðurkend av øðrum fullveldisríkjum. Eitt tjóðríki (*da: nationalstat*) er eitt fullveldisríki við einari tjóð sum íbúgvar, politisk og tjóðalig mørk samsvara nøkunlunda. Eitt hjálandaveldi (da: *kolonimakt*) er eitt fullveldisríki við undirskipaðum hjálondum ella hitt hægsta landið í hesum hjálandasambandinum. Kaj Leo Johannesen blandar hesi hugtøkini saman.

Kaj Leo skrivar, at einki fullveldisríki er til, sum ikki hevur handil við onnur lond. Og út frá hesum sínum uppáhaldi ger hann ta niðurstøðu, at einki veruligt fullveldisríki er til. Ikki eiti á logikkur.

Hetta byggir á gamla fatan av fullveldisríkjum frá teirri tíðini, tá ið øll vildu vera hjálandaveldi. Eftir krakkið á Wall-street í 1929 merktist búskaparliga kreppan millum landa og eisini í Føroyum. Tí fóru fullveldisríki at byrgja seg inni við tollmúrum og øðrum, fyri at steðga millumtjóðahandli, og heldur flyta rávørur inn úr hjálondum sínum. Tá gjørdist vanlig at halda, at fullveldisríki ikki skuldu hava handil sína millum.

Men hetta fór ikki at halda. Eftir seinra heimskríggj gjørdust hjálond sjálvstøðug fullveldisríki og hjálandaveldi tjóðríki. Summi hjálond gjørdust eisini tjóðríki. Og ongantíð hava so nógv tjóðríki og fullveldisríki verið til sum nú.

Arbeitt verður tó ímóti hesi tjóðríkjarørsluni. Tapararnir í tjóðríkjarørsluni, gomlu evropeisku hjálandaveldini, royndu herfyri við ES-grundlógini at gera ES til eitt satt stórsamveldi. Men hetta miseydnaðist. ES megnaði ikki at ganga ímóti tjóðríkjarørsluni.

Sostatt kunnu vit staðfesta, at niðurstøðan hjá Kaj Leo Johannesen er skeiv. Hvørki fullveldisríki ella tjóðríki eru á veg í søguna. Harafturímóti eru hjálandaveldini, sum júst Sambandsflokkurin umboðar, á veg í søguna. Sanniliga hava lond handil sína millum. Men hesin ávirkar ikki støðu teirra sum fullveldisríki ella tjóðríki.

Sambandið, sum vit hava til Danmarkar og Grønlands, hetta sum sambandsfólk nevna ríkisfelagsskap, er ein leivd av hjálandatíðini. Og hetta sambandið er á veg í søguna.

Ongantíð hava so nógv fullveldisríki og tjóðríki verið til sum júst nú. Og ein dag verða eisini Føroyar sum fullveldisríki og tjóðríki partur av altjóða samfelagnum, og ikki, sum nú, innilæst í einari gamlari leivd av einum hjálandaveldi.

# Áheitan á leiðara samgongunnar

**Løgmann Jóannes Ejdesgaard- og samgongutinglimir allar:**

**Vegna Miðflokkin**
*Jenis av Rana*
*Bill Justinussen*

Allir føroyingar harmast í hesum døgum tað vanlukkuligu støðu tjóðin er komin í av tí arbeiðssteðgi, ið enn einaferð leggur stóran part av samfelagnum lamið.

Í fjølmiðlunum hava einstakir samgonglimir gjørt vart við sína ónøgd, og 18 teirra, tvs. góður meiriluti av føroya løgtingi, heita á partarnar báðar at taka uppaftur samráðingarnar.

Ásannandi, at annar samráðingarparturin longu treytaleyst hevur tikið undir við uppskoti semingsmanna, og at bakland landsstýrisins, t.e. samgongumeirilutin, sigur seg ynskja frið aftur á arbeiðsmarknaðinum, heitir Miðflokkurin á Løgmann um at vísa samfelagsábyrgd og steðga verkbanninum. Skuldi hetta kravt, at ábyrgdarhavandi landsstýrismaður verður tikin av ræði, eigur hetta at verða gjørt, tí hvørki samfelagið sum heild, ella tey útjaðaraøkir, sum aftur hesaferð á serligan hátt merkja sviðan av arbeiðssteðginum, eiga at bera prísin fyri tí stuttskygni, sum eyðkennir hesa avgerð fíggjarmálaráðharrans.

Avgerðin liggur í hondum samgongunnar, umráðandi er at taka hana, tí meðan tosað og skrivað verður, farast samfelagsvirðir.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.